# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 14.06.2024 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | BL |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**
**Kunngerð**
**um**
**gjøld fyri tænastur o.a. frá Heilsustýrinum**

Við heimild í § 14 í løgtingslóg nr. 59 frá 29. mai 2024 um vevnaðarskrá, genomskrá, diagnosuskrá og ættarbandsskrá til gransking í mannaílegum og persónlagað medisin (Ílegulógin) verður ásett:

**§ 1.** Heilsustýrið tekur gjald fyri tær tænastur o.a., ið Heilsustýrið letur granskarum o.ø. atgongd til sambært ásetingum í hesi kunngerð.

**§ 2.** Gjøld fyri tænastur úr Vevnaðarskránni eru hesi:
1) At taka blóðroynd: 110,00 kr.
2) Tilfar til blóðroynd v.m.: 20,00 kr.
3) DNA uppreinsingar Kits: 65,00 kr.
4) Uppreinsað DNA frá blóði: 180,00 kr.
5) Uppreinsað DNA frá spýtti: 250,00 kr.
6) Uppreinsað DNA frá Formalin fixed parafin embedded, FFPE, blokkar: 310,00 kr.
7) Máta konsentratión við spektrofotometer: 3,50 kr. fyri hvørja roynd.
9) Útflýggja ekstraherað DNA: 20,00 kr. fyri hvørja roynd.

**§ 3.** Heilsustýrið ásetir harumframt gjald fyri rindan av teimum útreiðslum, sum standast av tænastunum, t.d. løn til lækna, sjúkrarøktarfrøðing og læknaskrivara o.tíl. sambært galdandi sáttmálum í sambandi við at greina sjúklingar og kontrollar og at leggja upplýsingar úr Diagnosuskránni og Ættarbandsskránni inn í Progeny til einstøku verkætlanirnar.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, dagfesting xxx

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig